# Niclas og nálareygað



**Tað gerst alt vanligari at taka tónleik av internetinum, har kend og ókend leggja tónleik út. Millum framburðarmestu tónleikarar á netinum í løtuni telist føroyski tónasmiðurin og framleiðarin Niclas Johannesen, ið hevur framleitt og skrivað fyri ein kanadiskan bólk, so hetta er kanska vegurin til eitt gjøgnumbrot fyri Niclas**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Í dag er vanligt, at kend og ókend leggja tónleik á internetið á sonevndar Mp3 fílar. So lurta fólk eftir hesum og "downloada", um hetta hevur teirra áhuga.

Kendasta heimasíðan í hesum sambandi er síðan www.mp3.com. Millum mest downloadaðu bólkar í dag er kanadiski bólkurin Two Marlowe, ið føroyski tónasmiðurin og framleiðarin Niclas Johannesen hevur framleitt og skrivað fyri.

Eini 10.000 fólk eru dagliga inni og taka tónleikin til sín og beint fyri jól høvdu fleiri enn 200.000 fólk verið inni á síðuni og tikið sær niður tónleik við Two Marlowe.

Fyri Niclas sum yrkistónleikara er hetta sjálvsagt eitt stórt stig á leiðini út í heim, eftir at hann og Lena á tónleikayrkisleiðini hava roynt at fingið fótafesti í Kanada.

## Poppur

Lena og Niclas fingu í 1998 góða umrøðu í Føroyum við fløguni hjá Lenu, Long Distance. Síðani hava tey roynt eydnuna í Kanada, og tað hevur gingið framá.

Tey hava havt ein sakførara at hjálpa sær á leiðini. Hesin bað ein dagin framleiðaran og tónasmiðin Niclas lurta eftir einum bólki, ið trongdi til eina bøtandi hond. Niclas metti, at her var hampuligt tilfar at arbeiða við. Síðani varð farið í gongd, Niclas framleiddi og skrivaði fyri bólkin, ið er settur saman av feðgunum Marlowe. Teir geva út á egnum forlag.

- Hesin maðurin kom til okkara sakførara og greitt var, at her kravdist, at tað bleiv produserað við kønari hond, sigur Niclas.

Hann hevur framleitt, skrivað og spælt. Óli Poulsen hevur lagt bassar á og ljómblandað og Lehnert Kjeldsen hevur mastrað.

Niclas er ikki heilt ósamdur í, at talan er um eitt lítið gjøgnumbrot, ið kann gerast til meira.

- Hetta er fínasta slag. Nú má satsast uppá, at enn fleiri vitja heimasíðuna, og so kann farast til plátufeløg, sigur Niclas.

- Mp3 er størsta heimasíða innan tónleik. Kend nøvn royna sín tónleik og minni kend leggja út agn, sigur Niclas, ið við hesum hevur fingið eina lopfjøl til okkurt størri.

Niclas nevnir, at eisini Chase er at finna á Mp3 síðuni.

Hann er longu biðin at taka sær av næstu fløgui hjá feðgunum Marlowe

At fáa gjøgnumbrot innan altjóða tónleik er sum at royna at sleppa ígjøgnum tiltikna nálareygað, men eingin ivi um, at Niclas Johannesen er ávegis.

Men Niclas hevur nógv jørn í eldinum og fyri framman eru fleiri sera spennandi ætlanir við nøkrum av teimum fremstu á føroyska tónleika pallinum, umframt at talið á vitjandi á Mp3 økist og Niclas er biðin til víðari samstarv við feðgunum Marlowe.

## FAKTA

Niclas Johannesen
Føddur í 1965
Óførur til m.a. tónleik og fótbólt
1986: Útgávan Niclas & The Crew
Leikti hesa tíðina eisini fótbólt í Frederikshavn
1990: Føroyameistari við HB
1992: Fyrsta útgávan hjá Chase
1997: Sangleikurin Skeyk
1998: Niclas og Lena: Útgávan Long distance
1999: Niclas giftist Lenu. Brúdleypið stendur í Sandagerði í Havn.
2001: Chase, næsta útgávan

…umframt nógv annað í nevndu tíðarbilum, tí her er bert farið um lívsleiðina í høvuðsheitum

## VIÐMERKINGAR

# Jeg tillader mig at gå efter bolden - og ikke efter manden!

**Lars-Emil Johansen**
*MF for Siumut*
*Den Nordatlantiske Gruppe*

Kære Jóannes Eidesgaard.

Jeg er medlem af SIUMUT, hvis repræsentant jer er i Folketinget. I folketinget har SIUMUT faktisk valgt at gå i samarnbejde med INUIT ATAQATIGIIT og REPUBLIKANERNE . Sammen har vi dannet Den nordatlantiske Gruppe, hvis første formand jeg er stolt af at være.

Jeg mener ikke, at der er noget mærkeligt ved, at Høgni, Kuupik og jeg - som medlemmer af denne nye gruppe i Folketinget - arbejder sammen, såvel politisk som organisatorisk.

Jeg ville ønske, at Føroya Jagnardarflokkur også var repræsenteret i Folketinget - og havde ønsket at medvirke til en koordineret indsats for selvstændighedsbegælserne i Nordatlanten, hhv i Savalimmiut og Kalaallit Nunaat.

Men dette er jo netop ikke tilfældet.

Derfor er det for mig ganske naturligt at søge samarbejde med de andre valgte repræsentanter fra vore lande her i Tinget. Her tager jeg ikke smålig skelen til, hvilke partier vi hver især kommer fra, men at vi kommer fra to dele af Det danske Rige - to rigsdele, der ønsker at arbejde for selvstændighed.

Jeg er enig med dig i, at afgørelsen om vore respektive landes politiske og forvaltningsmæssige status beror på vore folks afgørelse i sidste ende. Men det forhindrer mig ikke i, at jeg som borger i det samme rige kan have synspunkter om alt mellem himmel og jord, inklussive Føroya.

Lad os derfor berige hinanden med dialog, i stedet for at begrænse hinanden med censur og berøringsangst.

Med venlig hilsen - og rigtig glædelig jul.



# Rúsdrekka- og narkotikaráðið takkar fyri seg



*Pál Weihe er nærsti í síðsti formaðurin fyri Rúsdrekka- og narkotikaráðið, nú ráðið gevst at virka á nýggjárinum*

**Eftir at hava virkað í góð ellivu ár, verður Rúsdrekka- og narkotikaráðið avtikið 1. januar 2002. Endamálið, um ikki at veksa um nýtsluna av rúsdrekka, er eydnast. Fyribyrgingarráðið við víðkaðum arbeiðsøki tekur yvir frá fyrsta degi í komandi ári**

FYRIBYRGING
*Heri á Rógvi*

Hin fyrsta dagin í komandi árið, 2002, er tað einki, sum eitur Rúsdrekka- og narkotikaráðið longur. Orsøkin til hetta er, at landsins myndugleikar hava valt at skipa soleiðis fyri, at tað í framtíðini verður eitt Fyribyrgingarráð, har rúsdrekka og narkotika innganga sum partar av virkseminum.

Rúsdrekka- og narkotikaráðið varð sett á stovn í 1990 av Olaf Olsen, sum var landsstýrismaður um hetta mundið. Frá fyrsta degi av hevur rúsdrekka- og narkotikaráðið verið virkið í Føroyum. Men nú hetta harrans ár gongur móti endanum av sínum tíðarlopið, gevst ráðið at virka.

## Rúsdrekkalóg

Tað er einki yvir at dylja, at størsti parturin av virkseminum hjá Rúsdrekka- og narkotikaráðnum hevur havt við rúsdrekkalógina at gjørt. Rúsdrekkalógin byrjaði at virka í 1992, og hetta merkti eitt nú, at teir so væl vitjaðu rúsdrekkasølurnar sóu dagsins ljós og góvu teirra íkast til dagin og vegin hjá mongum borgara í landinum.

Uppgávan og endamálið við Rúsdrekka- og narkotikaráðnum er at vera rúsdrekkatálmandi, soleiðis at tað eitt nú verður forðað fyri misnýtslu. Rúsdrekka- og narkotikaráðið ásannar tann veruleika, at í Føroyum verður drukkið nakað av rúsdrekka, og hesa mynd kann Rúsdrekka- og narkotikaráðið royna at ávirka við fyribyrging fyri eygað.

Till tess at virka fyri, at rúsdrekkatálmandi málsetninginum, so metir ráðið, at kostnaðurin og atkomiligheitin vera best hóskandi evnini at royna at ávirka. Eisini hugburðarrøkt varð mett rættiliga ovarliga hjá ráðnum.

Í formansfrágreiðingini sigur Pál Weihe, at tað hevur alstóran týdning at virksemið hjá Rúskdrekka- og narkotikaráðnum ikki heldur uppat at virka – eisini um rúsdrekkasøla verður gjørd frí í Føroyum. Rúskdrekka- og narkotikaráðið er ímóti at loyva fríari sølu av rúskdrekka í Føroyum, t.e. at vanligar sølubúðir kunnu sleppa at selja rúsdrekka, sum vit eisini kenna úr eitt nú Danmørkini.

Rúsdrekka- og narkotikaráðið hevur eisini gjørt nógv við at fara út til skúlar og stovnar, har kunnað verður um rúsdrekka og hvørja ávirkan hetta kann fáa, við serligum atliti at misnýtslu. Tað hevur einamest verið Poul Jákup Thomsen, sum í góð fimm ár tók sær av hesari uppgávuni.

Nú ráðið er farið at gera upp, hvussu tað hevur eydnast hjá teimum hesi árini ráðið hevur virkað, so sita hesi í nevndini: Marjun Weihe, Lene Rauff Nielsen, Janus Jensen, UniVestureið, Eyðhild Christiansen, Kjartan Dam Joensen og Pál Weihe, formaður.

## Fyribyrgingarráð

Tað er tó ikki soleiðis, at virksemið hjá Rúsdrekka- og narkotikaráðnum heilt steðgar á nýggjárinum, um tó í einum øðrvísi líki. Landsstýrismaður setti fyri einum góðum ári síðani eitt fyribyrgingarráð, sum stutt og greitt kallast fyri Fyribyrgingarráðið.

Í Fyribyrgingarráðnum verða fleiri ráð, sum hava tykist við fyribyrging sameind í eina eind, eins og tað eisini er vorðið pláss fyri onkrum heilt nýggjum arbeiðsuppgávum, sum einki ráð hevur havt at tikið sær av frammanundan. Eitt nú AIDS-ráðið og Tubbaksráðið eru vorðin partar av nýggja fyribyrgingar myndugleikanum í Føroyum. Fyribyrgingarráðið hevur nú virkað í eitt ár, men fer veruliga undir sítt virksemi frá fyrsta degi í komandi ári.

Eins og við Rúsdrekka- og narkotikaráðnum, so er Fyribyrgingarráðið eisini mannað av umboðum frá ymsum myndugleikum.

Heðin Thomsen, formaður fyri Fyribyrgingarráðið, sigur, at teir fyrsta dagin fara at seta ein skrivara, sum skal mannað skrivstovuna hjá Fyribyrgingarráðnum. Eisini ætlar ráðið sær at gera sær dælt av konsulentum á ymsum økjum. Fyribyrgingarráðið hevur júst fingið høli úti á Argjum, og tað verður eisini har, at nýggi skrivarin kemur at starvast.

Heðin Thomsen kallar tað fyri fyribyrging móti vælferðarsjúkum, sum ráðið fyrst og fremst fer at fáast við, men hesa næstu tíðina verður miðjað ímóti at royna at skipa arbeiðið sum best. 1,3 milliónir eru settar av til virksemið hjá Fyribyrgingaráðnum.



*Rúsdrekkalógin og Rúsdrekkasølan hava sett síni spor í virksemið hjá Rúsdrekka- og narkotikaráðnum.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# 82 metrar eftir

Tað eru bert 82,5 metrar eftir at bora hjá teimum, sum hesa seinastu tíðina hava fingist við at gera undirsjóvartunnil um Vestmannasund. Tað merkir, at tað er minni enn fótbóltsvallarlongd eftir at bora undir Vestmannasundi. Væntandi verða Streymoyggin og Vágoyggin sameindir í aðru viku í januar.

Enn er fitt av vegaarbeiðið eftir at gera báðu megin tunnilin. Og sjálvandi skal eisini grót og annað ruddast av vegnum inni í sjálvum tunnilinum. Eftir ætlan skal arbeiðið verða liðugt á vári í 2003.

Arbeiðið við at gera undisjóvartunnilin um Vestmannasund fór ígongd 5. september 2000. Tað var tó ikki beinleiðis nakar nýggjur tanki at gera ein undisjóvartunnil, men eftir drúgt politiskt orðaskifti og kreppuár, so byrjaði arbeiðið við at gera ein undisjóvartunnil um Vestmannasund loksins síðsta ár.

Undisjóvartunnilin skal eftir ætlan vera 4,9 km. langur, tá hann er liðugur.

**hr**



*Tað verður fyrst í januar mánað, at Streymoyggin og Vágoyggin verða knýtt saman.*